§
Ítróttadómstólurin

**Úrskurður Ítróttadómstólsins viðvíkjandi kæru frá Neistanum um atburð hjá áskoðarum og heimildarfólki hjá Stjørnuni í sambandi við hondbóltsdyst tann 13. mars 2012.**

**Úrskurður Ítróttadómstólsins**
Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru, dagfest tann 10. apríl 2012 frá Neistanum um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Hondbóltssambandi Føroya, dagfestur 4. apríl 2012, um grovan munnligan ágang móti ávísum neistaleikara, tá ið Stjørnan og Neistin í Sunset kappingini leikti landskappingardyst tann 13. mars 2012.

Í viðgerðini í Ítróttadómstólinum hava fimm nevndarlimir luttikið: Anna Dam, forkvinna, Anja Hovgaard, næstforkvinna, Poul Hansen, Jóhan Lamhauge og Børge B. Hansen.

Semja er millum limir í Ítróttadómstólinum um, at allir limir eru gegnigir til at viðgera kæruna.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

**Málslýsing**
Tann 13. mars 2012 varð dystur leiktur í Klaksvík millum Stjørnuna og Neistan í bestu føroysku kvinnudeildini, Sunset kappingini.

Neistin ger galdandi, at Stjørnu viðhaldsfólk og heimildarfólk undir dystinum framdu munnligan ágang móti neistaleikara, ið var kynsdiskriminerandi og ærumeiðandi. Neistin upplýsir í kæru síni, at hetta er ikki fyrstu ferð, at ágangur er framdur móti sama leikara undir dysti á heimavølli hjá Stjørnuni.

Hondbóltsfelagið Stjørnan ger galdandi, at tey til allar teirra heimadystir hava tey eftirlitsfólk, sum Hondbóltssamband Føroya hevur álagt øllum feløgum at hava til heimadystir, og metir Stjørnan, at hesi eftirlitisfólk gera teirra arbeiða til fulnar.

Stjørnan ger harafturat galdandi, at tað er ómøguligt hjá teimum at fyribyrgja, at tað millum einar 200 heitar áskoðarar er onkur, sum ikki dugur sær hógv og sum rópar happandi og niðrandi eftir ávísum leikara.

Harumframt avvísir Stjørnan, at formaðurin í felagnum skal hava rópt eftir neistaleikaranum.

**Málsgongd**
Málið var fyrst kært til Aganevndina hjá Hondbóltssambandi Føroya, sum metti, at hon ikki kundi gera meira við hetta málið, tí at talan er um póstand móti póstandi, og at tað liggur uttanfyri virkisøki hjá Aganevndini at hava veruliga prógvførslu, sum munnligar avhoyringar mugu metast at vera.

Aganevndin viðmerkir, at tað innan hondbóltsheimin hvørki í føroyskum ella evropeiskum hondbóltshøpi tykjast at vera reglur, sum í nóg greiðan mun, út í æsir, snúgva seg um støður, sum hetta málið snýr seg um, eins og tað heldur ikki tykjast at vera reglur, sum áseta annan sanktiónsmøguleika enn eina ávaring til felag, sum

verður mett at hava tikið lut í happandi og/ella niðrandi atburði mótvegis leikara á mótstøðuliðið.

Neistin kærir úrskurðin hjá Aganevndini fyri Dómsnevndini hjá Hondbóltssambandi Føroya, sum staðfestir avgerðina hjá Aganevndini og viðmerkir, at fyri at kunna staðfesta hvat er farið fram í hesum málið, er neyðugt við veruligari próvførslu.

**Ítróttadómstólurin skal viðmerkja**

Tað er av týdningi at skyna ímillum sjálvan dystin (tað Ítróttaliga) og ábyrgdina hjá felagnum fyri óhóskandi og niðrandi atburð millum áskoðarar og heimildarfólk (disciplinær viðurskifti).

Í mun til sjálvan dystin er tað vanliga soleiðis, at fráboðanir frá dómarunum eru avgerandi. Dómararnir taka støðu til atburðin hjá liðunum, tað veri seg leikarum, venjarum, liðleiðarum v.m. á vøllinum og uttanfyri vøllin. Vanligt er ikki at nýta sjónband sum próvførslu til at broyta dómaraavgerðir, uttan so at talan er um serstøk mál so sum harðskap.

Atburðurin hjá áskoðarunum verður ikki reguleraður av teimum Ítróttaligu reglunum, sum eru galdandi fyri dystin, men av øðrum reglum.

Hondbóltssamband Føroya hevur sum part av sínum reglum áseting, ið er soljóðandi:

> ***Serlig krøv til bæði liðini, sum leika dyst.***
>
> *Áskoðarar:*
>
> *c) Dómararnir til dystin hava rætt at bróta dystin av og krevja áskoðarar burturvístar fyri serliga grovan atburð.*
>
> *Kappingarnevndin kann døma eitt felag at gjalda bót eftir sektarreglugerð fyri ikki at røkja skyldurnar í sambandi við fyriskipan nøktandi.*
> *Í serliga grovum førum ella um dømi eru um endurtøku, kann talan vera um, at felag missir heimavøll ein ella fleiri dystir, ávikavist at álagt verður at leika ein ella fleiri dystir við ongum áskoðarum (uttan fíggjarligt endurgjald.)*

Í slíkum sakum er próvførslan frí, og tað merkir, at øll próvførsla t.d. sjónbond, ljóðupptøkur, vitnisfrágreiðingar o.s.fr kunnu nýtast.

Ítrottardómsstólurin metir sostatt, at Aganevndin eigur at taka málið upp til nýggja viðgerð og kann Aganevndin nýta ta próvførslu, sum er neyðug til tess at málið verður nóg væl lýst, til at avgerð kann takast. Tað veri seg, sjónbandaupptøkur, ljóðupptøkur, munnligar frágreiðingar v.m. Aganevndin kann við heimild í omanfyrinevndu áseting um "*Serlig krøv til bæði liðini, sum leika dyst*" realitetsviðgera kæruna frá Neistanum.

## Úrskurður

Grundað á frammanfyri standandi avgerð Ítróttardómstólurin, at málið verður heimvíst til nýggja realitetsviðgerð í Aganevndini.

Tórshavn, tann 13/4 – 2012

Anna Dam | Anja Hovgaard | Poul Hansen

Børge B. Hansen | Jóhan Lamhauge